# Flogbóltskvinnur á Tvøroyri siga farvæl við buldri og braki

**Tað verður fýrverk, ábit og leskidrykkir til børn og vaksin, tá ið flogbóltskvinnurnar hjá TB fáa føroyameistarasteypið og gullheiðursmerki handað í ítróttarhøllini á Tvøroyri í morgin**

HÁTÍÐARHALD
*Áki Bertholdsen*



*Í morgin spæla TB kvinnurnar í flogbólti sín seinasta dyst í hesum kappingarárinum. Hann verður á Tvøroyri og tá fáa tær eisini steyp og gullheiðursmerki handað. TB vónar nógvar áskoðarar úr allari oynni í høllina at hátíðarhalda dagin saman við liðnum*

Tá ið flogbóltskvinnurnar av Tvøroyri í morgin spæla sín seinasta dyst í ár, verður tað eitt farvæl til kappingarárið, sum tað sømir seg einum røttum greipuvinnara.

Í morgin tekur TB ímóti ÍF í seinasta seinasta dystinum í hesum kappingarárinum og í tí sambandinum verður skipað fyri stórum hátíðarhaldi í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Dysturin verður klokkan 15, men sama, hvussu úrslitið av dystinum verður, er tað longu greitt, at TB kvinnurnar eru Føroyameistarar.

Men tað er í morgin at kappingarárið endar og tí skil verður tað aftaná dystin í morgin, at umboð fyri Flogbóltssamband Føroya fara at handað TB kvinnunum føroyameistarasteypið og gullheiðursmerkini sum sjónliga prógvið um úrslitið í ár og tá kunnu tær formliga kallað seg meistarar.

Men hjá TB kvinnunum byrjar morgindagurin fyrr enn so, tí á miðdegi hevur TB bjóða spælarum, mótstøðuliði, venjarum, nevndarlimum, býráði, dómarum, umboðum fyri Ítróttarsamband Føroya og øðrum, morgunmat í matstovuni í Ítróttarhøllini.

Og tá ið steyp og heiðursmerki eru handað, bjóðar TB øllum áskoðarunum í høllini landgongubreyð við viðskera og afturvið tí, bjóðar Restorffs bæði børnum og vaksnum okkurt at drekka.

Og sum rosinan í pylsuendanum fer Gamlaársnevndin at skjóta fýrverk uttanfyri høllina, flogbóltskvinnunum til heiðurs.

Um kvøldið hevur Býráðið bjóðað TB-spælarunum døgverða.

Virgar Djurhuus, venjari hjá TB, sigur, at hann vónar, at nógvir áskoðarir úr allari oynni koma í høllini at hátíðarhalda dagin saman við TB kvinnunum.

Og tað er sanniliga nakað at hátíðarhalda, tí umframt FM-heitið, hevur TB eisini vunnið steypakappingina.

Hetta er fyrstu ferð, at fremsta deildin hjá TB í flogbólti vinnur nakað sum helst. men tá ið tað skuldi vera, løgdu tær ikki fingrarnar ímillum.

Men at tað júst var hesum ættarliði av flogbóltskvinnum, at tað skuldi fella í lut at skriva ítróttarsøgu á Tvøroyri, er kanska ikki av tilvild, tí tær flestu av teimum hava spælt saman, síðani tær vóru sjey ára gamlar og tær eru tí væl samanspældar. Tær hava eisini vunnið alt, sum er at vinna øll árini, bæði gentur 12, gentur 14, gentur 16 og unglingar, sum av teimum hava vunnið bæði 3. deild, 2. deild og 1. deild, men tær hava ongantíð vunnið meistaradeildina, fyrrenn nú, tær settu seg á ovastu trúnuna.

### Útlendskan venjara

Tá ið kappingarárið byrjaði, duldi tey, sum stíla fyri fyri flogbóltinum á Tvøroyri, at tey settu sær høg mál fyri í ár og summi teirra vóru so ósmæðin at siga, at í ár skuldi tað vera, at TB skuldi upp á ovastu rók.

Málsetningurin hevur eisini hildið í ríkiligt mát - næsta ár ætla tey at koyra á aftur.

Tað var ikki við góðum vilja, at Virgar Djurhuus varð venjari hjá kvinnunum í ár, men hann tók við sum ein neyðloysn, tá ið italski venjarin, sum kom til TB seinasta heyst, fór av landinum aftur.

Og hóast tað gekk so væl í ár, sum nakar kundi krevja og vænta, heldur hann framvegis fast við, at hann verður ikki at venjari aftur næsta ár, uttan at hann verður »noyddur« til tað,.

– Eg verið ikki venjari næsta ár, uttan so, at ongin annar fæst til starvið, sigur hann.

Hann sigur, at hann hevur verið flogbóltssvenjari í 18 ár. Hann følir seg rætt og slætt útbrendan og heldur, at hann hevði havt gott av einum steðgi. Tí kundi ein fremmandur venjari eisini givið honum íblástur ímeðan hann løddi battaríini frá síðulinjuni í eina tíð.

TB hevur eisini samband við ein fremmandan venjara. Talan er um ein útlending, sum býr í Føroyum, og tað er sumt, sum bendir á, at tað verður hann, sum skal lyfta arvin eftir Virgar, tí báðir partar eru áhugaðir fyri samstarvi.

Men enn er als onki avgjørt og spyrst onki burturúr og eydnast ikki at fáa ein annan, skilst, at Virgar verður at tosa við......

### Berjast fyri bronsuni

Hóast TB longu er føroyameistari, kunnu áskoðararnir vænta at tað verður spennandi í ítróttarhøllini í morgin, tí dysturin hevur alstóran týdning fyri ÍF. Vinna tær, tryggja tær sær samstundis bronsuna í ár. Men tapa tær í morgin, fellur avgerðin ikki fyrenn á seinasta leikdegi, sum verður næsta vikuskiftið, tá ið ÍF skal vestur í Vágar at spæla ímóti Drátti, sum er eitt stig aftanfyri.

# Fyrsti rækjutrolarin farin undir hamaran

**Hvannaberg úr Vági fekk bara eitt hálvt ár í føroyska fiskiflotanum, tí nú er hann farin á heysin**

HÚSAGANGUR
*Áki Bertholdsen*




*Rækjutrolarin, Hvannaberg, úr Vági, er longu farin undir hamaran. Hann varð keyptur til Føroya í mars í fjør men síðani hevur tað gingið so illa, sum tað yvirhøvur kundi og so var ongin vegur aftur, sigur Jákup Olsen*

Tað var við stórum vónum, at Jákup Olsen í Vági, Eyðun Johannesen á Tvøroyri, og onnur, seinasta summar keypti rækjutrolaran Hvannaberg úr Íslandi.

Men sigast kann ikki, at vónirnar hava hildið, tí nú er Hvannaberg longu farin á heysin og sostatt er fyrsti rækjutrolarin farin undir hamaran.

Tað er norski bankin, Finansbanken, sum fíggjar Havnnaberg, ið nú hevur kravt hann seldan á tvingsilssølu. Nær tað verður, er ikki greitt, men rættarfundur verður seinni í hesum mánaðinum.

Hvannaberg hevur ligið við bryggju í Havn, síðani hann kom aftur av einum fullkomiliga miseydnaðum túri í Barentshavinum og nú er tað so greitt, at hann loysir ikki aftur, fyrrenn hann hevur ligið undir hamaranum.

– Vit skuldu betala 1,5 millión í rentum og avdráttum hálvan februar, men bankin var hvørki til at høgga ella stinga í. Hann vildi ikki hoyra talan um at útseta gjaldið og kravdi tí bátin undir hamaran, sigur Jákup Olsen.

Rækjutrolarin kostaði annars ikki meiri enn 14 milliónir at keypa og tí søgdu eigararnir tá ið hann kom, at tað skuldi ganga óvanliga illa, skuldi tað ikki eydnast at fáa hann at bera seg.

Men tað hevur eisini gingið óvanliga illa og báturin fekk so vánaliga byrjan, sum hugsast kundi.

– Fyrst gekk tað fýra mánaðir frá tí at vit keyptu bátin í mars, til hann slapp til fiskiskap fyri skipasýni og øðrum pappírum, ið skuldi útvegast. Norski bankin, sum seldi bátin, kravdi hann á skipasmiðju í Skagen og tað mundi ikki blivið liðugt og tískil slapp hann ikki til fiskiskap, fyrrenn í august. Sostatt fall fyrsti avdrátturin longu áðrenn hann slapp til fiskiskap og hevði fovunnið eitt oyra.

– Men harafturat miseydnaðist fiskiskapurin fullkomiliga, tí hann fiskaði ikki fyri meiri enn 2,7 milliónir í fjør.

Fyrst lá hann leingi við kei við skaða og tá ið hann slapp útaftur, fekk hann ikki fiskað fyri ísi og vánaligum veðri.

Heimaftur komin fyri jól, vóru trupulleikar við motorinum, og í tí sambandinum setti skipasýnið krøv til ymsar umvælingur, sum nú eru gjørdar á Tórshavnar Skipasmiðju.

– Sostatt var tað ein samanrenning av vánaligum líkindum, maskinskaða, vánaligum rækjuprísi seinføri hjá almennum myndugleika og einum banka, sum hvørki var til at høgga ella stinga í, sum gjørdi, at fíggjarliga grundarlagið varð tikið undan bátinum.

– So tá ið rentur og avdráttir aftur fullu nú hálvan februar, vóru ongir pengar at gjalda við og sostatt var bara ein vegur og tað var beint undir hamaran, sigur Jákup Olsen.

### Vónar at vágbingar liggja framvið

Jákup Olsen harmast um, at báturin skuldi fara. Sjálvir ivast hann í um gomlu eigararnir fara at royna at fáa bátin aftur.

Men hann vónar, at vágbingar, ella aðrir suðuroyingar, fara at liggja framvið.

– Nú er Hvannaberg í sera góðum standi, tí nú er maskina og alt tikið í botn og umvælt, so nú er talan í hvussu so er um eitt gott skip, sum kundi loyst til fiskiskap í morgin, um so skuldi verið.

– Somuleiðis hevur hann víst í illveðri, at hann eisini er sera sjógott skip.

– Tað hevði verið harmiligt, skuldi hann farið av landinum aftur, tí nú haldi eg, at hann man vera frægasti djúpvatnstrolari, sum er í landinum.

– Somuleiðis hevur hann tann fyrimun framum aðrar djúpvatnstrolarar, at hann hevur frystilast, so hann kundi eisini fiska rækjur ein part av árinum.

Hann vísir eisini á, at vágbingar eiga eitt fiskiloyvi til djúpvatnsfisk, sum Sancy hevði. Avtalað er gjørd við teir, sum áttu Sancy um at knýta kvotuna at Hvannaberg og tað hevur Landsstýrið góðkent.

– Sostatt er talan um ein bát við nógvum møguleikum, sigur Jákup Olsen.

Umframt djúpvatnsloyvi hjá Sancy, hava eisini hvalbingar eitt fiskiloyvi til djúpt vatn, sum ikki er í brúki og Jákup Olsen vónar í hvussu so er, at báturin verður verandi í oynni.

– Er tað onkur, sum leitar eftir einum trolara, kundi hetta verið ein skjót og góð loysn, sigur Jákup Olsen.



# Valskriði í samgonguni

**Løgmaður vil ikki sita eftir við svartaperi á komandi løgtingsvali og valdi tí at geva eftir, tá Karsten Hansen og samgongulimir úr Norðoyar valdømi løgdu trýst á hann fyri at fáa eitt hálvliðugt og lógarteknískt óforsvarligt uppskot um undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð í tingið sum valagn.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*



*–Hevði eg ikki lagt uppskotið um Norðoyartunnilin fyri tingið, so kundi tað blivið brúkt ímóti mær, sigur løgmaður.*

Óseriøst. So fáorðað er lýsingin av tí, sum hendi í samgonguni hósdagin, fáar tímar undan seinastu freist at lata lógaruppskot inn til løgtingið. Lýsingina eiga bæði løgmaður og vinnumálaráðharrin. Tað, sum hendi var, at anlegslógin fyri Norðoyartunnilin í síðstu løtu varð løgd fyri tingið, hóast semja frammanundan var í samgonguni um at tað var best at bíða til næstu tingsetu, tí uppskotið var ikki liðugt.

–Hatta er ikki júst nakað sum fremur virðingina fyri politisku skipanini, sigur Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri um avgerðina at senda uppskotið í tingið í allarseinastu løtu.

–Avgerðin bleiv tikin av reint politiskum orsøkum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Av reint lokalpolitiskum orsøkum kanska?

–Ja, tað kanst tú gott siga. Hetta er politikkur í hægsta geari.

Ella valtaktikkur í hægsta gerari...

–Ja, eisini tað. Eg vil ikki risikera at sita eftir við svartaperi í hesum her. Hevði eg ikki lagt uppskotið fram, so er stórur møguleiki fyri at onkur annar landsstýrismaður hevði gjørt tað, og so kundi tað verið brúkt ímóti mær politiskt í ólukkumát, sigur ein opinskáraður Anfinn Kallsberg, løgmaður, um avgerðina at senda uppskotið um anlegslóg fyri Norðoyartunnilin í tingið í síðstu løtu.

### Ymsar fatanir

Sjálv forsøgan um anlegslógina fyri Norðoyartunnilin, sum í varð borin í løgtingsskrivstovuna hósdagin beint áðrenn seinastu freist at leggja fram tingmál, er ein søga, ið er uppfatað ymiskt av teimum ymsu landsstýrismonnunum.

Tað var sjálvur løgmaður, ið sendi lógaruppskotið inn til løgtingsskrivstovuna, tí Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, ið hevur ábyrgdina av málinum, noktaði at seta sítt navn undir.

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, og Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, eru so at siga ikki samdir um nakað viðvíkjandi gongdini í málinum.

–Tað var full semja á landsstýrisfundi um at uppskotið ikki skuldi leggjast fram í tí ófullfíggjaða líki, tað var í. Men í síðstu løtu kúvendi Karsten Hansen og legði trýst á løgmann fyri at fáa uppskotið í tingið kortini. Tá vóru tveir tímar eftir til freistin var úti, og av tí at uppskotið ikki var lógarteknískt eftirkannað, kundu hvørki eg ella umsitingin í Vinnumálastýrinum leggja navn til tað, er frágreiðingin hjá Bjarna Djurholm, um hví hann noktaði at bera uppskotið í løgtingið.

### Bjarni bleiv firtin

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sær gongdina øðrvísi

–Bjarni Djurholm vildi hava uppskotið lagt fram í tí líki, sum tað er nú, men tað fekk hann ikki semju fyri á landsstýrisfundi. Tá eg so royni at fáa uppskotið lagt fram, verður Bjarni Djurholm firtin og fer beint niðan í útvarpið og sigur, at uppskotið ikki er klárt at leggja fram, er frágreiðingin hjá Karsteni Hansen um sama mál.

–Karsten ánar ikki hvat hann tosar um. Landsverkfrøðingurin, nevndin í partafelagnum fyri Norðoyartunnilin og Vinnumálastýrið hava arbeitt við fullum trýsti í tveir mánaðir, men náddu ikki á mál. Eg segði á landsstýrisfundi, at vit náddu hertil og ikki longur í hesum valskeiðnum, og landsstýrisfundurin valdi tá at bíða við uppskotinum. Tí bleiv uppskotið ikki sent í lógardeildina til eftirkanningar, og av tí sama var tað als ikki klárt, tá Karsten Hansen knappliga fekk vildi hava tað í tingið kortini, er aftursvarið hjá Bjarna Djurholm.



*–Uppskotið var ikki lógarteknískt eftirkannað. Tí kundu hvørki eg ella umsitingin í Vinnumálastýrinum leggja navn til tað, sigur vinnumálaráðharrin.*

### Broytt komandi tingsetu

Nú liggur eitt lógaruppskot um anlegslóg fyri Norðoyartunnilin á løgtingsskrivstovuni, men tað verður ikki avrit av hesum, sum tingmenn fáa á borðið í komandi viku. Uppskotið er nevniliga ikki lógarteknískt forsvarligt og tískil verður arbeitt hart í umsitingini komandi dagarnar fyri at orða uppskotið av nýggjum, so ta kann leggjast fram á tingi.

Ikki ein einasti tinglimur tykist at vera ímóti uppskotinum um at gera undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð, og tí er væntandi, at uppskotið fær positiva viðgerð.

Men í verandi líki umfatar uppskotið um anlegslóg fyri Norðoyartunnilin bert sjálva tunnilsgerðina. Vegagerð og annað uttan fyri sjálvan tunnilin náddi ikki at gerast partur av uppskotinum, og tí verður eitt tað fyrsta uppskotið á tingborði komandi tingsetu helst ein broyting av lógini, so hon fer at umfata alt arbeiðið í sambandi við tunnilsgerðina.

–80 prosent av uppskotinum er klárt. Restin manglar. Hevði tað ikki verið